

*Sum støðan er nú, haldi eg ikki, at tað ber ikki til at endurskapa tað álit sum bæði samstarvsfelagar og landsstýrismaðurin mugu hava á leiðaranum fyri Landsjúkrahúsi sigur Helena Dam á Neystabø í uppsagnarbrævinum til Jákup Mørkøre*

# Jákup Mørkøre fingið øksina frá Helenu Dam á Neystabø

*– Jákup Mørkøre, sjúkrahúsleiðari, verður nú sagdur upp, tí hann megnar ikki at stýra landssjúkrahúsinum á ein nøktandi hátt. Hann hevur heldur ikki tann neyðuga loyalitetin og tað neyðuga lýdni mótvegis politisku skipanini, sum krevst, sigur Helena Dam á Neystabø*

ÁKI BERTHOLDSEN

Nú verður Jákup Mørkøre, leiðari á Landsjúkrahúsinum sagdur upp.

Í einum brævi til Jákup Mørkøre í dag sigur Helena Dam á Neystabø, at arbeiðslagið hjá honum, helst hesar seinastu dagarnar, hevur víst, at hann ikki megnar at stýra og at leiða Landssjúkrahúsið á ein nøktandi hátt og at hann ikki vísir tann neyðuga loyalitetin og tað neyðuga lýdni mótvegis politiska myndugleikanum, sum hann arbeiðir undir.

Og soleiðis sum gongdin hevur verið, hevur landsstýrismaðurin ikki álit á, at arbeiðslagið fer at batna.

Hon leggur afturat, at av einum leiðara á hansara støði, verður kravt, at hann vísir neyðugan loyalitet mótvegis teimum avgerðum, sum politiski mundugleikin tekur.

Men ein leiðari má eisini hava tað neyðuga hegnið til at samskifta við starvsfólk, álitisfólk, fakfeløg og tey, sum hann annars samstarvar við.

– Tí hevur landsstýrismaðurin í umbúna at loysa tygum úr starvi, sigur Helena Dam á Neystabø í brævi til Jákup Mørkøre.

### Elvir til óneyðugan ampa

Tað, sum landsstýrismaðurin sipar til, er m.a. hendingin, tá ið Jákup Mørkøre fortaldi fyri Dimmalætting í oktober í fjør, at tað fór at verða neyðugt at siga 40-50 fólkum upp á Landssjúkrahúsinum, uttan at hann visti, hvussu stór játtanin til Landsjúkrahúsið fór at vera.

Og nú boðaði hann aftur frá, at neyðugt fór at verða við 20-27 uppsagnum.

Men hvørki mótvegis deildarleiðarunu, sjúkrahúsráðnum ella landsstýrismanninum sjálvum, kundi hann grundgeva fyri meiri enn 10 uppsagnum.

Og at Jákup Mørkøre gav deildarleiðarum á Landssjúkrahúsinum boð um at seta nøvn á uppsagnirnar, uttan uppá nakran máta at vísa á, hvussu virksemið skal vera á deildunum framyvir, tekur Helena Dam á Neystabø sum eitt dømi um, at hann ikki átekur sær neyðuga leiðsluábyrgd

Helena Dam á Neystabø vísir sigur, at mátin, sum Jákup Mørkøre samskiftar við starvsfólkið og deildaraleiðararnar um sparingarnar, er við til at skapa óneyðugan ampa og ótryggleika og ger fakfeløgini meiri til mótpart enn neyðugt er.

Helena Dam á Neystabø sigur, at hin hevur tvær ferðir heitt á Jákup Mørkøre skrivliga, um at broyta atburð og at vísa loyalitet.

Men framferðin hesar seinastu dagarnar í sambandi við sparingarnar hevur víst, at hann hevur ikki tikið tað til eftirtektar.

Eitt nú bað hann á fundi hósdagin í farnu viku, deildarsjúkrasystrarnar seta nøvn á uppsagnir, hóast hann frammanundan hevði fingið at vita, at tær skuldu ikki setast í verk.

Hetta vísir ólýdni og greitt brot á loyalitet ímóti politiska myndugleikanum, sigur Helena Dam á Neystabø.

– Og sum støðan er nú, verður mett, at tað ber ikki til at endurskapa tað álit sum bæði samstarvsfelagar og landsstýrismaðurin mugu hava á leiðaranum fyri Landsjúkrahúsi, leggur hon afturat.

Helena Dam á Neystabø sigur, at áðrenn endalig støða verður tikin til uppsagnina hevur Jákup Mørkøre fingið freist til 2. februar at koma við sínum viðmerkingum.

Aftaná tað verður endalig støða tikin til uppsagnina.

## Rættarskipanin virkar ikki

JOHN JOHANNESSEN

– Tað er ov lætt sloppið av landsstýriskvinnuni at tveita Jákupi Mørkøre ábyrgdina fyri, at hon ikki megnar sínar uppgávur.

Bjørn á Heygum, sum hevur verið við til at gjørt nýggju stýrisskipanina, heldur avgjørt, at hetta málið vísir okkum, at parlamentarisma ikki virkar í Føroyum.

Bjørn á Heygum vil ikki siga, um hann heldur, at misálit átti at verið lagt ímóti Helenu Dam á Neystabø. Hann vísir á, at áðrenn hetta verður gjørt, eigur landsstýrisfólkið at hava framt so mikið stórt brot, at alt álit er rokið.

– Eg kann tó siga, at rokið innan almanna- og heilsumál er við at gerast so groft, at tað er á markinum til misálit.

Men væntast kann tó ikki, at slíkt hendir. Sambært Bjørn á Heygum hava føroyskir politikarar als ikki skilt møguleikan við at leggja fram misálit. Teir fata slíkt, sum at misálit verður lagt ímóti einum heilum flokki, og tí rýkur samgongan, verður misálit lagt móti Helenu Dam á Neystabø.

– Skipanin við at leggja fram misálit hevur einki við flokkarnar at gera. Tá misálit verður lagt móti landsstýrisfólki, er talan um boð til flokkin, ið eigur landsstýrisfólkið, um at finna eitt annað landsstýrisfólk.

– Trupulleikin við verandi landsstýri er, at Tjóðveldisflokkurin er bangin fyri, at fullveldisætlanin rýkur, um misálit verður lagt á Helenu Dam á Neystabø, og tí kann hon toyggja sær, sum hon vil, sigur Bjørn á Heygum.



# Jákup syndabukkur fyri Helenu

*Bjørn á Heygum, advokatur, er sannførdur um, at Helena Dam á Neystabø hevur offrað Jákup Mørkøre fyri at sleppa undan politiskum trupulleikum*

JOHN JOHANNESSEN

– Høvuðsuppgávan hjá einum og hvørjum almennum stjóra er at halda seg innanfyri ásettu játtan. Tí var neyðugt hjá sjúkrahússtjóranum at seta sparingar í verk, tá honum varð sýtt fyri at fáa eykajáttan.

Bjørn á Heygum er onga løtu í iva um, at Jákup Mørkøre hevur røkt sínar skyldur sum sjúkrahússtjóri, og at hann er uppsagdur tí at landsstýriskvinnan í Almanna- og Heilsumálum hevur tørv á at finna ein syndabukk í málinum.

– Tað er beinleiðis ræðuligt at skuldseta ein alment settan stjóra fyri illoyalitet, tá tað, hann ger, ið veruleikanum er at røkja sínar skyldur.

### Fekk ikki eykajáttan

Jákup Mørkøre boðaði, eftir at hava sæð fíggjarlógaruppskotið, í noveber frá, at hann fór at søkja um eykajáttan, tí tað bar ikki til at reka Landssjúkrahúsið innan ásettu játtan.

Hesi boð vórðu ikki væl móttikin. 25. november fekk hann skriv frá Høgna Joensen, aðalstjóra á Almanna- og Heilsumálastýrinum, har sjúkrahússtjórin verður mintur á, at hann vegna politiska myndugleikan er settur at reka Landssjúkrahúsið innanfyri teir karmar, sum politiski myndugleikin áleggur honum.

Sjúkrahússtjórin skal við øðrum orðum innanfyri ta játtan, sum sett er av, reka Landssjúkrahúsið við teimum uppgávum, sum politiski myndugleikin áleggur honum.

Harafturat verður víst á, at tað verður mett, sum tekin um vantandi loyalitet mótvegis politiska myndugleikanum, at sjúkrahúsleiðarin loyvir sær at søkja um eykajáttan.

Støðan endar av hesi orsøk við, at Landssjúkrahúsið onga eykajáttan fær. Hetta merkir, at sjúkrahúsleiðarin má fara at hugsa um sparingar. Og hetta heldur Bjørn á Heygum vera einasta møguleikan sjúkrahúsleiðarin hevur, eftir at hava fingið boðini um, at hann ikki kann søkja um eykajáttan.

– Sum sagt, skal ein almennur stjóri halda seg innanfyri ásetta fíggjarkarm, og tí má Jákup Mørkøre í hesum føri seta sparingar í verk, sigur Bjørn á Heygum.

### Landsstýrið vaskar hendur

Landssjúkrahúsið má nú spara, men Helena Dam á Neystabø, landsstýriskvinna, lovar, at hon skal finna 1,6 milliónir aðrastaðni innan almanna- og heilsumál til Landssjúkrahúsið, so sparingarnar ikki gerast so ógvusligar.

Tó fær sjúkrahúsleiðarin sambært skjølum, Jákup Mørkøre hevur skrivað,11. januar at vita frá aðalstjóranum í Almanna- og Heilsumálastýrinum, at hann skal spara 3 milliónir í lønum í fíggjarárinum 2000. Talan er ikki longur bert um 1,4 milliónir, sum sjúkrahúsleiðarin áður helt.

Nú er neyðugt við uppsagnum, og sjúkrahúsleiðarin kunnger eitt tal á 27 uppsagnir. Hann ber feiri ferðir fram ynski um at sleppa at kunna landsstýriskvinnuna um sparingarnar, men fær, sambært teimum frágreiðing, hann hevur skrivað, at vita, at ikki er neyðugt at kunna landsstýriskvinnuna um málið. Hon er nevniliga fult kunnað.

– Her haldi eg, at Jákup Mørkøre ber seg púra rætt at. Tí er tað fullkomiliga burtur úr vón og viti at ákæra hann fyri at vera illoyalan, sigur Bjørn á Heygum.

Advokaturin og fyrrverandi politikarin vísir víðari á, at tá landsstýriskvinnan nú hevur sett sjúkrahúsleiðaran frá við teirri grundgeving, at hann er illoyalur og ikki kann samstarva, er hetta ein roynd hjá landsstýriskvinnuni at finna ein syndabukk í málinum um Landssjúkrahúsið, so hon sleppur undan politiskum trupulleikum. Hann vísir í hesum sambandi á, at alt bendir á, at landsstýriskvinnan var ávara un avleiðingarnar av sparingunum.

– Almanna- og Heilsumálastýrið vaskar í hesum føri hendur og klínir allan skittin á Jákup Mørkøre, staðfestir Bjørn á Heygum og setur spurningin, um vit í Føroyum kunnu góðtaka, at ein stovnsleiðari verður sagdur úr starvi fyri at røkja sínar skyldur.



*Bjørn á Heygum heldur, at Helena Dam á Neystabø við uppsøgnini av sjúkrahússtjóranum hevur vaska hendurnar og klínt skittin á Jákup Mørkøre*

# Aldri kunnað um 27 uppsagnir



*Helena Dam á Neystabø vil ikki gera viðmerkingar til málið um sjúkrahúsleiðaran, tí talan er um eitt persónsmál*

*Helena Dam á Neystabø sigur seg einans hava hoyrt um eitt tal um 8 til 10 uppsagnir á Landssjúkrahúsinum*

JOHN JOHANNESSEN

Tað stendur orð móti orði millum Helenu Dam á Neystabø og Jákup Mørkøre í málinum um sparingar á Landssjúkrahúsinum.

Landsstýriskvinnan sigur seg aldri hava hoyrt um, at 27 fólk máttu sigast úr starvi, fyri at tað skuldi bera til hjá sjúkrahúsleiðaranum at halda seg innan fyri givnu fíggjarkarmar. Hon hevði einans hoyrt um eitt tal á 8 til 10 uppsagnir, sigur hon og vísir á, at vit í dag fáa sjón fyri søgn, nú tær 27 uppsagnirnar ikki eru framdar.

### Persónsmál

Jákup Mørkøre vísir í skrivi á, at hann fleiri ferðir bað um fund við landsstýriskvinnuna um sparingarnar og avleiðingarnar av sparingunum, men fekk at vita frá Høgna Joensen, aðalstjóra í Almanna- og Heilsumálastýrinum, at hetta var ikki neyðugt, tí landsstýriskvinnan var fult kunnað um málið.

Um hetta er so, vil Helena Dam á Neystabø einki siga um. Hon vísir á, at so leingi málið um Jákup Mørkøre koyrir, fer hon ikki at gera nakarar viðmerkingar til einstakar útsagnir, tí talan er um eitt persónsmál, og tí skal hon fylgja ávísum mannagongdum.

Einasta viðmerkingin, Helena Dam á Neystabø vil gera til sjálva uppsøgnina av sjúkrahúsleiðaranum er, at Jákup Mørkøre í løtuni ikki er leiðari á Landssjúkrahúsinum.

### Skal húsast við ábyrgd

Helena Dam á Neystabø sigur, at Landssjúkrahúsið hevur fingið 13 milliónir eyka at húsast við í ár, og heldur hon, at tað átti at borið til hjá sjúkrahúsleiðaranum at húsast á forsvarligan hátt innan givnu karmar.

– Tað er sjálvsagt, at vit skulu rationalisera, men munur er á 8 - 10 uppsagnum, sum avleiðing av samanlegging og á 27 uppsagnum. Rationaliseringar krevja viðhvørt uppsagnir, men tær eiga í longdini at føra til eina betran, sigur landsstýriskvinnan.

Helena Dam á Neystabø sigur, at tað nú verður hildið fram at gera Landssjúkrahúsið til eitt betri stað, og skal hetta millum annað gerast við at leggja eina langtíðar sjúkrahúspolitikk. Hon vísir í sama sambandi á, at Landssjúrkahúsið í fjør fekk játtað 5 milliónir til tól, og at sjúkrahúsverkið í ár hevur fingið út móti 4 millixónum.

– Landssjúkrahúsið kemur upp á pláss, hóast viðurskiftini ikki eru so góð í løtuni. Vit fara framhaldandi at betra um karmarnar hjá Landssjúkrahúsinum við útbyggingum og so framvegis, men tað verður gjørt eftir fíggjarligu orkuni í landinum, sigur Helena Dam á Neystabø at enda.

CAR OF THE YEAR FOCUS 1999

**P/f Wenzel**

**Bjóðar røttu brúktbilaloysnina til rætta prísin. Goymslan er á tremur við hágóðskubilum til nógv niðursettar prísir**

**Brúktir bilar**

| Merki: | Skrás.: | Km.: | Prísur: |
|---|---|---|---|
| Ford Fiesta 1,8 Diesel | '91 | 101.000 | 49.000,- |
| Ford Escort 1,6i CLX | '95 | 85.000 | 84.000,- |
| Ford Escort 1,6i CLX | '95 | 45.000 | 89.000,- |
| Ford Escort 1,6i CLX | '95 | 48.000 | 89.000,- |
| Ford Escort 1,8D | '95 | 123.000 | 99.000,- |
| Ford Escort 1,8D 3 H. | '95 | 44.000 | 99.000,- |
| Ford Escort XR3i | '87 | 153.000 | 25.000,- |
| Citröen 1,6i ZX 5 H. | '91 | - | 59.000,- |
| Ford Fiesta 1,25i | '96 | 13.000 | 83.000,- |
| Ford Fiesta 1,3i | '96 | 28.000 | 83.000,- |
| Ford Escort 1,4i CLX | '95 | 20.000 | 64.000,- |
| Ford Fiesta 1,25i | '96 | 36.000 | 89.000,- |
| Ford Mondeo 1,8i | '93 | 180.000 | 90.000,- |
| Ford Escort 1,6i | '97 | 62.000 | 94.000,- |
| Ford Fiesta 1,8D | '97 | 35.000 | 94.000,- |

Kom út til okkara - vit finna bilin, ið tær dámar! Góður avsláttur, um eingin býtisbilur er. Vit eru altíð til at snakka við

**P/f Wenzel**

www.wenzel.fo

Akranesgøta 5 - FO 100 Tórshavn - Tlf. 313873 - Fax 311173

Sosialurin - 311820